gult20 cyan20 magenta20 svart20



# Glaður vinnari

**- Eg haldi ikki, at vit dugdu at vinna, segði Petur Jensen úr Clickhaze, eina løtu eftir, at prixaldurnar høvdu lagt seg í Norðurlandahúsinum**

PRIX FØROYAR
*Dagfinn Olsen*



- Vit dugdu slett ikki at vinna, segði ein glaður Petur Jensen, tá Prix Føroyar 2001 var liðugt, og hann sipaði til, at tey meira bilsin, enn glað á at líta, komu á pall at verða heiðraði.

Heldur merktur av prixaldunum, viðgongur Petur í stuttum práti, at limirnir í Clickhaze høvdu tónleikin í blóðinum og at tað kendist rætt.

- Eg kendi meg heima.

- Tað er, sum er okkara tónleikur líka nógv inneftir, sum úteftir, hugleiðir Petur.

Og blaðmaðurin kann ikki halda sær, men má varisliga spyrja, um limirnir í Clickhaze spæla sermerkta tónleikin fyri sær sjálvum, fyri sína egnu skuld.

Men hetta skilir Petur ikki.

- At spæla fyri sær sjálvum? Tað er tað sama, sum at spæla yri øðrum. Eg kenni ikki munin, sigur Petur og ger snildisliga tápuliga spurningin til einkis.

Hann viðgongur, at eftir heldur ruðuleikakenda byrjan, var veruliga talan um ein kekkaðan bólk at enda.

- Jón meldaði okkum til undir øðrum navn, tí í veruleikanum var Clickhaze ikki til longur. Men kom so afturí aftur, greiðir frá og er troyttur og væl nøgdur vinnari.

- Tað, sum var so sera gott hesaferð var, at allir bólkar vóru á jøvnum føti viðvíkjandi møguleikanum at sleppa at leika á útlendskum festivali, sigur Petur Jensen tá vit eina stutta stund steðga glaða vinnaranum í gongini í nærum manntóma Norðurlandahúsinum eftir finaluna.

# Danskir fjølmiðlar á staðnum

**Eini 15 útlendskir gestir vitjaðu Prix Føroyar 2001. Milum teirra tónleikaummælarar frá størru donsku bløðunum**

PRIX FØROYAR
*Dagfinn Olsen*

Festivalfólk, framleiðarar, tónleikarar og fjølmiðlafólk úr Norðurlondum taldust millum gestirnar til finaluna á Prix Føroyar í ár.

Millum onnur vóru Uffe Christensen frá Jyllands Posten, Erik Jensen frá Politiken og Torben Kruse frá Musikeren.

Sum heild tóktust donsku tónleikaummælararnir væl nøgdir, um enn ummælarum líkt, so høvdu litføgru lýsingarorðini heldur langan veg fram í ljósið.

Tiltakið var merkt av heldur mongum ymsum stílum, var ein av mongu niðurstøðunum, ið eisini innihelt orðið ruðuleikakent.

Men rætt skal vera rætt, so vóru hørðu pennarnir í danska blaðheiminum ikki sørt hugtiknir og fegnir um upplivilsið, tí frammanundan kendu teir einki til føroyskan tónleik. Og avgjørt mettu teir,at Prix Føroyar var eitt stig á røttu leið, tí við hesum koma føroyskir bólkar út um landoddarnar at leika. Og at støðið fyri stóran part var høgt, tyktist eisini semja um.

Kvøldið fyri Prix Føroyar, høvdu teir verið við til Free Føroyar konsertina, so ikki kann sigast annað, enn at teir hava fingið haldgott grundarlag at byggja sínar metingar á, eftir stuttu vitjanina í Føroyum.



*Danskir tónleikaummælarar frá størru donsku bløðunum taldust millum gestirnar til Prix Føroyar finaluna 2001*
*(Mynd: D. Olsen)*

# Nógvur sera harður rockur

**Umboð frá Jellingfestivalinum funnu sítt umboð úr Føroyum, nevniliga Týr. Umboð fyri festivalin meta, at sera nógvir dugnaligir tónleikarar eru í Føroyum, sammet við fólkatalið**

PRIX FØROYAR
*Dagfinn Olsen*

Tá vit hittu eitt av teimum trimum umboðunum fyri Jelling festivalin, hevði hann longu funnið bólkin, ið skuldi vitjað Jellingfestivalin. Hetta, hóast vinnarin av Prix Føroyum kappingini enn ikki var kosin.

- Tað verður Týr, ið skal vitja Jellingfestivalin. Týr vóru originalir, hóast eg t.d. ikki visti av, at talan var um eitt kvæði. Eg helt, at hetta áttu teir at lønast fyri, sigur umboðið fyri Jellingfestivalin.

Sum so mangur annar, so metir umboðið frá Jelling, at nógv dygdargott var at velja í.

- Clickhaze var originalt. All That Rain leiktu sera væl, I Am dugdu væl og leiktu væl og sum heild vóru øll góð. Men sera nógvur harður rockur var á skránni og eg saknaði okkurt bleytari ímillum. Tí hugsaði eg eisini eina løtu um Tám, men til festivalin má taka hædd fyri heildarmyndini og tí fall valið á Týr. Týr er avgjørt ein bólkur, ið kann klára seg, sigur umboðið fyri Jellingefestival, ið vit fingu orð á.

Eisini hesin gesturin var sera hugtikin av tiltakinum sum heild og hevði rósandi orð um Prix Føroyar sum heild.



# Samdir um Clickhaze

**Tey trý umboðini frá Nibe Festivalinum samdust um Clickhaze, sum gest til festivalin og valdi harvið, uttan at vita tað, Prix føroyar vinnaran 2001**

Føroyskur tónleikari býr í Aalborg og skal eisini leika á Nibefestivalinm í ár

PRIX FØROYAR
*Dagfinn Olsen*

Festivalumboðini valdu sínar gestir, áðrenn dómaraatkvøðurnar vórðu taldar upp. Nibe festivalurin valdi vinnaran, Clickhaze.

- Vit samdust skjótt um Clickhaze. Hetta var gott, tí frammanundan høvdu vit avrátt, at semja skuldi vera okkara millum. Og at bólkurin so, vann, kundi jú ikki vera betri, sigur Peter Møller Madsen, eina umbiðið fyri Nibe Festivalin.

Spurdur, um hann kennir nakað til føroyskan tónleik, sigur Peter M. Madsen, at tað ger hann ikki, men at frálíkur føroyskur tónleikaumboðsmaður býr í Aalborg.

- Terji Massel býr í Aalborg og er frálíkt umboð. Hann skal leika á Nibe Festivalinum í ár. Hann torir og er egin, júst sum støðan er við Clickhaze, sigur Peter Møller Madsen.

- Hóast 8 bólkar, so tyktist kvøldið og tiltakið ikki langt, sum slíkt annars lættliga ger, sigur hann.

- Og talan var um áskoðarafjøld ”med gang i”, staðfestir Peter, ið eisini her tekur hædd fyri, at ikki var loyvt at hava rúsdrekka við til tiltakið.

Eisini Peter Møller Madsen varð mestsum tikin á bóli av tiltakinum í síni heild.

- Jeg var IMPONERET, og det må du godt skrive med store bogstaver, sigur Peter Møller Madsen, og tað er hervið gjørt.

Hann fegnast um Clickhaze og dylir tað ikki. Hann ætlar at vera við til at breiða út boðskapin um henda bólk, ið hann veruliga metir hevur potentiali. Og hann leggur dent á, at tá tosar hann ikki bert um sangarinnuna Eivør, men allan bólkin.

- Eg skal gera tað, eg kann, fyri at rætta bólkinum ein hjálpandi hond, sigur Peter Møller Madsen væl nøgdur.



*- Jeg var IMPONERET, og det má du godt skrive med store bogstaver, sigur Peter Møller Madsen, og tað er hervið gjørt*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

gult21 cyan21 magenta21 svart21



# Jákup bestur í Danmark

**Men hóast føroyski landsliðsmálverjin stórspældi í málinum hjá Herfølge, so er bjargingin longri burturi nú, enn hon var undan vikuskiftinum**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*

Jákup Mikkelsen gjørdi góða reklamu fyri sær sjálvum sunnudagin. Nú tað bara eru smáir tveir mánaðir eftir, inntil sáttmálaskeiðið millum Herfølge og Jákup verður liðugt, ræður um at vísa stórspæl, soleiðis at onnur feløg fáa eyguni upp fyri fuglinum, sum uttan nakað endurgjald til felagið er klárur at flúgva úr reiðrinum.

Tað veit Jákup Mikkelsen væl. Kanska veit hann eisini meiri enn vit onnur gera. Tað vil í hesum førinum siga, um nøkur avtala er skrivað millum Jákup og okkurt annað felag enn Herfølge. Her verður hugsað um FCK, sum tað fyrr í ár ljóðaði, at Jákup hevði gjørt sáttmála við.

Men uttan mun til hvussu tað stendur til við sáttmálasamráðingunum, so varð tað aftur sunnudagin staðfest, at føroyingar eiga ein sera dugnaligan málverja í Danmark.

Jákup Mikkelsen og Herfølge spældu á útivølli ímóti FCM. Samansetta liðið hjá Ikast og Herning hevur havt nógvan undanvind tær seinastu vikurnar. Hesa ferð vunnu teir 2–0, og tað ber við sær, at FCM nú av álvara er við í kappingini um meistaraskapin. Teir kappast fyrst og fremst við grannarnar úr Silkeborg.

## Mistu tveir menn

Herfølge var komið til Jyllands fyri at halda tætt. Tað eydnaðist ikki, og tað er synd at siga, at meistaraliðið frá í fjør hevur eydnuna við sær. Longu undir upphitingini fór tað at ganga illa. Tá varð ein av verjuspælarunum so mikið skaddur, at tað var ikki hugsningur um, at hann kundi spæla.

Fyrstu løtuna gekk væl at halda heimaliðnum burturi frá málinum hjá Jákupi Mikkelsen. Men tá 35 minuttir vóru farnir, viknaðu fyritreytirnar fyri at fáa stig heilt nógv. Liðformaðurin, Thomas Høyer fekk tá næsta gula kortið, og so royndi undirmannaða Herfølge at leggja uppaftur størri dent á verjupartin, enn teir høvdu gjørt frammanundan.



*Í Herfølge stríðast teir fyri lívinum í bestu deildini, men hóast eitt gott avrik frá Jákupi Mikkelsen, noyddust teir um vikuskiftið at lúta fyri Silkeborg*

## Fleiri ferðir ein ímóti einum

Bæði í Ekstra Blaðnum og í fótbóltsprogramminum hjá TV3 – tað eigur onside – varð Jákup Mikkelsen kosin at vera besti maður á vøllinum, og í báðum miðlunum mettu teir, at sunnudagin var Jákup Mikkelsen besti málverjin í Danmark.

FCM skoraði málini í 77. og í 90. minutti. Bæði málini vóru skorað av monnum, sum komu inn á liðið hjá FCM í 2. hálvleiki. Í tí fyrra førinum var Morten Skoubo púra leysur í brotsteiginum, og í tí seinna førinum var Frank Kristensen leysur fyri málinum, tá hann stútaði.

Møðin fór rættuliga at gera um seg á Herfølge liðnum í 2. hálvleiki. Eftiransingarnar vóru ikki so sannførandi, og tað kom fleiri ferðir fyri, at Jákup Mikkelsen var ein ímóti einum. Hvørja ferð fór føroyski málverjin sigrandi úr hesum tvídystunum.

Men hóast gott avrik hjá Jákupi og nógv rós í fjølmiðlunum, so myrknaði støðan hjá Herfølge uppaftur meiri. Nú eru teir trý stig aftanfyri lægst stadda liðið omanfyri niðurflytingarstrikuna. Sunnudagin fær Herfølge vitjan av AGF. Um meistarunum skal verða lív lagað í bestu deildini, so er tað heilt neyðugt, at teir fáa øll stigini ímóti AGF.

# Julian og Kurt komu á talvuna

**Sogndal skoraði einasta málið, tá sekundvísarin var á veg fyrstu ferð runt**

TIPPELIGA
*Jóannes Hansen*

Tað var kæti í Sogndal sunnukvøldið. Eftir sera skinklandi fyrsta umfarið, tá Sogndal á útivølli tapti 3–0, og nervarnir so at siga høvdu hingið uttan á troyggjunum, var tað mett at hava alstóran týdning fyri gongdina næstu umførini, um tað í øðrum umfari fór at eydnast hjá Sogndal at fáa stig og at vinna.

Og tað eydnaðist. Við Juliani Johnsson og Kurt Mørkøre ímillum teir fyrstu ellivu vann Sogndal sunnukvøldið á heimavøllinum 1–0. Tað sóu knappir tvey túsund áskoðarar, sum stórliga fagnaðu sínum monnum við fyrsta sigrinum í bestu deildini.

Mótstøðuliðið var Lyn úr Oslo. Á sama hátt sum Sogndal, so flutti Lyn síðsta kappingarár upp úr næstbestu deildini.

Julian Johnsson var á miðvøllinum hjá Sogndal allar 90 minuttirnar. Kurt Mørkøre varð skiftur út, tá tað restaði ein stórur hálvur tími. Kristian Ystaas, sum eisini í fjør var við í kappingini um eitt pláss í álopinum hjá Sogndal, loysti føroyska álopsmannin av.

Longu ífyrsta minutti skoraði Sogndal tað, sum skuldi vísa seg at verða einasta málið. André Herfindal stútaði í kassan, eftir at miðvallarin Rune Bolseth hevði lagt innfyri. Tá bólturin fór um strikuna, vóru bara 40 sekund farin, vita norsku fjølmiðlarnir at siga.

## Málverjin dagsins maður

Hóast øll stigini vóru eftir í Sogndal, so eru nógvir av norsku fjølmiðlunum samdir í, at størsta partin av tíðini var tað Lyn, sum leikliga var omaná, og teir trýstu fyri í hvussu so er at fáa javnleik. Men tað eydnaðist ikki.

Størsti heiðurin fyri, at tað hilnaðist so væl, fær málverjin hjá Sogndal. Terje Skjeldestad varð eftir dystin kosin fyri besti maður á vøllinum.

Komandi sunnudag bíðar aftur ein torfør uppgáva. Tá skulu Julian Johnsson, Kurt Mørkøre og hinir í Sogndal spæla á útivølli ímóti Lillestrøm, sum frammanundan at Rosenborg gjørdist so at siga einaráðandi í norskum fótbólti, vann nógv NM og átti fleiri landsliðsspælarar.

Úrslitini í næsta umfarinum í bestu deildini í Noregi vóru hesi: Bodø/Glimt – Odd Grenland 1–1, Bryne – Stabæk 0–1, Moss – Viking 1–3, Rosenborg – Molde 2–1, Strømgodset – Lillestrøm 1–2, Tromsø – Brann 2–0 og Sogndal – Lyn 1–0.

# Javnleikur í Hollandi

**Súni Olsen var ikki á vøllinum, tá FC Zwolle um vikuskiftið leikti javnleik**

HOLLAND
*Jákup Mørk*

FC Zwolle hevur rættiliga fingið ferð á síðani vetrarsteðgin, men um vikuskiftið gekst tó ikki heilt eftir vild hjá liðfeløgunum hjá Súna Olsen.

FC spældi á útivølli móti MVV, sum telist millum niðastu liðini úr deildini, og tað um reppið, at heimaliðið fór av stað við øllum.

Tíggju minuttir fyri leiklok eydnaðist nevnliga heimaliðnum at leggja seg á odda, og tað var ikki fyrr enn í næst seinasta minutti, at Zwolle aftur fekk javnvág í roknskapin.

Við javnleikinum misti Zwolle eitt fet í oddastríðnum, men enn halda teir fast um triðja plássið á stigatalvuni.




i Sosialurin